## AaB í oddinum

AaB – har føroysku spælararnir enn ikki eru tøkir eftir skaða – er enn við oddinum í donsku superliguni. Sunnudagin vann AaB trupla útidystin í Esbjerg 2-1. Esbjerg var annars á odda, men við málum frá nýinnkeyptu Rade Prica og Nomwethe megnaði AaB tó at koppa spennandi uppgerðini. Saman við AaB hava Brøndby og FCK eisini fult stigatal, nú tvey umfør eru spæld av superliguni.

**-mørk**

## Landis vann Tour'in



Tað gjørdist amerikanski Floyd Landis úir Phonak-liðnum, sum vann ársins útgávu av Tour de France. Landis tóktist annars hava mist sín møguleika, tá hann á 16. etapuni misti nógva tíð í mun til restina av feltinum. Men í 17. etapuni gjørdi hann bart. Hann streyk einsamallur avstað, og tá munurin til feltið bara øktist, kundi hann aftur standa ovast, áðrenn seinastu tíðarkoyringina, har hann eisini hevði næstbestu tíðina. Norski Thor Hoshovd vann annars seinastu etapuna, og gjørdist hann soleiðis fyrsti súkklarin, sum hevur vunnið bæði prologin og seinastu etapuna.

**-mørk**

# Venja minni og vinna meiri



*Todi tykist vera ein av spælarunum, sum í løtuni verða hvíldir á beinkinum, tá Start spælir*

**Eftir at venjarin varð uppsagdur, hava teir vant minni í Kristiansand, og tað hevur borið betri úrslit við sær hjá liðnum, har Todi Jónsson nú er eykamaður**

NOREG
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er gott fótbóltslag í Kristiansand, har teir nú bíða eftir seinni í vikuni at spæla móti Skála.

Orsøkin til, at lagið er gott, er tann, at úrslitini eru vorðin nógv betri, síðani teir skiftu venjara. Tað gjørdu teir dagin eftir, at Start hevði spælt á Svangaskarði móti Skála.

Síðani Tom Nordlie varð uppsagdur, hevur Start spælt tveir dystir, og teir hava vunnið báðu ferðirnar. Hóskvøldið vunnu teir á heimavølli í áttandaparts-finaluni í steypakappingini 3-1 móti Brann úr Bergen.

Sunnukvøldið høvdu teir í landskappingini vitjan av sigursvanda Rosenborg, og teir úr Tróndheimi vórðu sendir til hús aftur við 2-1 tapi. Hetta var fyrsta ferðin í tíggju mánaðir, at Rosenborg tapti á útivølli.

Í Start ivast teir ikki í, hvør høvuðsorsøkin er til, at úrslitini nú eru væl betri, enn tey vóru undir gamla venjaranum:

– Vit venja minni nú, enn vit gjørdu. Tað ber við sær, at vit hava størri yvirskot, tá ið tað veruliga ræður um, og tað hava vit fingið gagn burturúr bæði hóskvøldið í steypadystinum og aftur í landskappingardystinum í kvøld, segði ein av Start spælarunum, Stefan Bärlin, eftir uppgerðina móti Rosenborg. Harvið sipaði hann eisini til, at fyrrverjandi venjarin tuskaði spælararnar so til, at teir ikki megnaðu at finna neyðugu orkuna, tá ið teir spældu dystir.

Sammett við tá ið Start spældi móti Skála, var tað eitt nú í sambandi við fyrra Start málið øðrvísi uppspæl. Svenski Stefan Bärlin fekk í ferðini bóltin fyri føturnar, og so varð hann leysur, tá ið hann skoraði. Hetta var fyrsta málið hjá honum í landskappingini í ár. Hetta slagið av uppspæli var tað, sum Start í fjør vann silvurkrónurnar uppá. Higartil í ár hevur eingin dynamikkur verið í uppspælinum. Tað sást væl, tá ið Start spældi móti Skála.

### David fyri Toda

Hóskvøldið var Todi Jónsson ikki millum teir fyrstu ellivu á Start liðnum. David Nielsen, sum á Svangaskarði loysti Toda av, var miðframherji. Hann skoraði eitt mál í 3-1 sigrinum á Brann.

Sunnukvøldið var Todi aftur á beinkinum, og David var aftur miðframherji. Aftur hesa ferð loysti Todi David Nielsen av. Hesa ferð vóru átjan minuttir eftir, tá ið føroyski spælarin kom á vølllin í Kristiansand, har tað vóru knappliga tíggju túsund áskoðarar.

Sigurin á Rosenborg ber við sær, at Start flutti av niðurflytingarplássinum, sum teir í fleiri vikur hava verið á. Nú er munurin frá Start og fram til Rosenborg, sum er á bronsuplássinum, bara seks stig. Í Kristiansand er lagið so mikið gott nú, at teir siga seg ikki ivast í, at teir kunnu fara at verða við í kappingini um heiðursmerkini.

Nú royna teir í Start at savna hugsanirnar um retur uppgerðina móti Skála. Tann dysturin verður í Kristiansand hósdagin. Start hevur frá útidystinum móti Skála 1-0 leiðslu, áðrenn teir fara undir heimadystin.

Skála ferðalagið fer úr Føroyum seinnapartin týsdagin, og um alt viðvíkjandi ferðini fer at ganga, sum roknað verður við, so verður Skála ferðalagið aftur í Føroyum seinnapartin ólavsøkuaftan.

## Símun í semifinaluni

**Vágbingurin í Keflavík staðfesti sigurin á útivølli móti ÍA við fínum lobbara**

ÍSLAND
JÁKUP MØRK

Símun Samuelsen stórtrívist í Íslandi og Keflavík. Alt kappingarárið hevur hann verið millum teir mest eyðsýndu í landskappingini, og sunnukvøldið hevði hann aftur stóran leiklut, tá ið Keflavík tryggjaði sær sess í hálvfinaluni í steypakappingini.

Keflavík spældi á útivølli í Akranesi móti ÍA. Talan var um rættuliga undirhaldandi uppgerð, har tað eftir íslendskum umstøðum vórðu skorað sjáldsama nógv mál. Keflavík vann 4-3, eftir at tað í steðginum hevði verið javnleikur 1-1.

Keflavík var framman fyri 1-0 og 2-1, men báðu ferðirnar svaraði heimaliðið aftur. Tað restaði eitt korter, tá ið Keflavík legði seg framum 3-2, og fimm minuttir seinni økti Símun Samuelsen, sum aftur hesa ferð var á vøllinum alla tíðina, um leiðsluna til 4-2. Talan var um sera vakurt mál. Símun lobbaði bóltin upp um málverjan hjá ÍA.

Heimaliðið minkaði um munin til 4-3 í 87. minutti. So komu ikki fleiri mál, og harvið eru Símun Samuelsen og Keflavík í hálvfinaluni.

Þróttur og Víkingur spældu seg eisini í hálvfinaluna sunnukvøldið. Á Laugardalsvøllinum í Reykjavík vann Víkingur grannauppgerðina móti Vali 2-1, og á Akureyri vann Þróttur 5-1 móti KA. Síðsta fjórðingsfinalan verður í kvøld, tá ið KR á heimavøllinum í Frostskjólinum fer at taka ímóti ÍBV.